# ÚTLOND

SAMBAND
FARTEKST@MAIL.DK

*-USA er farið á glið í veðurlagsmálinum, og eg vænti, at eg kann ávirka forsetan eitt sindur* (*Tony Blair*).

# Nógv at keglast um



*Tony Blair fer á sínum seinasta G8-fundi at leggja dent á veðrið.*



*George W. Bush hevur Darfur og AIDS sum høvuðsmál á fundinum í Heiligendamm.*



*Angela Merkel hevur Afrika sum sítt høvuðsmál.*



*Vladimir Putin leggur størsta dentin á rakettverju og vápnadubbing.*

**Tony Blair sigur, at G8-fundurin í Heiligendamm er miseydnaður, fæst ikki semja um veðurlagið, men George W. Bush leggur størri dent á rakettir og rakettverju**

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað stendur ikki á hjá leiðarunum í G8-londunum at finna fundaraevni, nú teir sjey menninir og tann einsamalla kvinnan hittast til fundar í lítla, týska frítíðarbýnum Heiligendamm við Eystrasalt.

Eitt tað ovasta málið á dagsskránni er veðurlagið og serstakliga tann seinasta veðurlagsfrágreiðingin frá ST. Hóast tíðin hjá Kyoto-sáttmálanum er farin at styttast, hava tey átta framvegis møguleikan at fáa nakað munagott burturúr, skrivar Reuter, sum eggjar teimum til at skriva undir og at fylgja avtaluni. Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, sum er á sínum seinasta G8-fundi, segði í gjár, at tað ræður um at fáa USA við, men George W. Bush, forseti, hevur sagt, at hann skrivar ikki undir nakað, sum er bindandi fyri USA, uttan so at lond sum Kina og India gera tað sama.

## Afrika svikið

Fyri tveimum árum síðani samdust teir átta leiðararnir um at tvífalda hjálpina til Afrika innan 2010. Hetta var eitt lyfti, sum veruliga vakti ans, men tíðin hevur víst, at leiðararnir hava havt ilt við at fylgja lyftinum. Einki av teimum átta londunum hildið lyftið. Bretland, sum gekk undan fyri at fáa hjálpina tvífaldaða, er farið tann øvugta vegin, skrivar Reuters og vísir á, at fyri fyrstu ferð síðani 1997 er bretska menningarhjálpin til Afrika minkað.

– Úrslitið hevur verið eitt stórt vónbrot, sigur Lord Jay of Ewelme, sum var bretskur sameáðingarleiðari á G8-fundinum í 2005.

Týski kanslarin, Angela Merkel, hevur sagt, at hon ætlar ikki, at G8-leiðararnir skulu gloyma Afrika-lyftið, og hon hevur sett sær fyri at taka tað uppaftur á fundinum í Heiligendamm. Leiðararnir skulu eisini umrøða trupulleikarnar við AIDS í Afrika, og í tí sambandi eru fleiri afrikanskir leiðarar bodnir til Heiligendamm.

## Rakettir

Á tí uttanríkispolitiska økinum hava tey átta fleiri spurningar á dagsskránni. Ein teirra er støðan í sudanska landspartinum Darfur og sudanska mótstøðan ímóti, at ST-hermenn koma hagar at tryggja frið.

Kosovo er eisini á skránni. USA og Evropa eru til reiðar at lýsa Kosovo sum eitt sjálvsstøðugt land, men tað vilja russar ikki.

Miðeystur er á skránni á hvørjum G8-fundi og soleiðis eisini hesaferð, og helst verður úrslitið, at tey átta fara at mæla ísraelsmonnum og palestinum at fara til samráðingarborðið.

Amerikanska rakettverjuætlanin í Evropa skal eisini umrøðast. Russiski forsetin, Vladimir Putin, hevur fleiri ferðir ávarað um, at amerikanska ætlanin kann hava við sær, at vápnakappdubbingin byrjar av nýggjum, og Russland hevur longu roynt nýggjar rakettir.

Ein spurningur, sum eisini verður viðgjørdur í Heiligendamm, er, um G8 skal víðkast. Fyrrverandi týski kanslarin Helmuth Kohl, sum í 1975 legði lunnar undir G-fundirnar, hevur sagt, at lond sum Kina, Brasil, India, Meksiko og Suðurafrika eiga at fáa innbjóðing næstu ferð.

# Stúra fyri flóðaldum

**Nógvastaðni í Noregi hvørvur frostið í jørðini, og tað kann fáa sera álvarssamar avleiðingar**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ein stótut partur av norska fjallalendinum er fryst alt árið, og frostið ger sítt til at halda lendinum. Men tann veksandi hitin á Jørðini fær nú jarðfrøðingar at ávara um, at hvørvur frostið úr jørðini, kann tað fáa álvarssamar avleiðingar nógvastaðni í Noregi.

Lyngen í Troms er eitt av støðunum, sum jarðfrøðingarnir halda eyga við. Lendið har flytir seg tríggjar centimetrar um árið, og eina ferð í framtíðini endar tað við, at fleiri milliónir rúmmetrar av gróti, eyri og mold fara í havið. Nú frostið í jørðini hvørvur, stúra granskararnir fyri, at omanlopið kann koma fyrr, enn teir fyrr hava væntað.

– Omanlopið verður tað størsta í søguligari tíð í Norðurnoregi, og flóðaldan verður ovurstór, sigur Lars Harald Blikra, sum er granskari á norska jarðfrøðistovninum, við tíðarritið Apollon.

## STUTT SAGT

### Milliónir flýggja

Nýggj tøl hjá ST vísa, at meiri enn fýra milliónir irakar eru flýddir frá húsi og heimi, síðani landið varð álopið. 2,2 milliónr eru flýdd av landinum, og hini eru flóttafólk í egnum landi. Jennifer Pagonis, sum er talskvinna hjá flóttafólkadeildini hjá ST, sigur, at vandi er fyri, at uppaftur fleiri irakar velja at fara heiman, tí irakska stjórnin megnar ikki at útvega teimum mat, heilivág og aðrar tænastur, samstundis sum trygdarviðurskiftini eru stak vánalig. Nógvir irakar líða eisini undir, at nógvir landspartar hava stongt sítt mark, tí teir vilja ikki hava fleiri flóttafólk.

### Evropa ikki mál

Iranski samráðingarmaðurin í kjarnorkumálum, Ali Larijani, sigur við iransku tíðindastovuna ISNA, at evropearum nýtist ikki at stúra fyri teimum nýggju iransku rakettunum, tí tær verða ongantíð vendar ímóti Evropa, sigur hann. Larijani sigur, at Iran hevur gott samband við Evropa, og at einki hald er í amerikanska illgrunanum, at Iran fer at venda sínum álopsrakettum ímóti málum í Evropa. Hann sigur amerikanska illgrunan vera ársins skemt.

### Ísland og Miðeystur

Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, sum herfyri tók við sum íslendskur uttanríkisráðharri, segði í Altinginum í gjár, at hon ætlar at knýta tættari samband millum Ísland og teir palestinsku sjálvsstýrismyndu gleikarnar. Uttanríkisráðharrin segði, at hon umhugsar at fara til Miðeysturs fyri at vita, um Ísland kann gera seg galdandi har. Ingibjörg Sólrún Gísladóttir nevndi, at hon hevur í hyggju at leita sær stuðul frá norska uttanríkisráðharranum, Jonas Gahr Støre, sum hevur drúgvar royndir í Miðeystri og kennir økið væl.